

*Tað var ein ógvuliga konstruktivur fundur, og vit fingu nógv av skafti, eins og vit lærdu sera nógv, sigur formaðurin fyri áhugabólkin, Bjørghild Djurhuus, sum her sæst sita fyri endan á fundarborðinum. Samanborið við hini norðanlondini eru vit sera væl við, sigur hon*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Okkum vantar hagtøl um føroysk børn

**– Vit hava øll tølini frá øllum skúlakanningum, sum hava verið í landinum. Men tølini eru ikki savnað til hagtøl, og tað er spell, tí vit fáa ikki nýtt tey, sum nú er, sigur Bjørghild Djurhuus, sum er formaður fyri áhugabólki fyri børnum og heilsu. Áhugabólkurin hevur júst skipað fyri einum góðum, norðurlendskum samstarvsfundi í Havn**

SAMSTARVSFUNDUR
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

Í Føroyum hava vit fimm áhugabólkar innan heilsurøkt. Til dømis arbeiðir ein innan eldraøkið, ein arbeiðir fyri sálarsjúk og ein áhugabólkur er so eisini, ið arbeiðir fyri børnini.

Hesin síðstnevndi hevur einar 40 limir, sum allir dagliga arbeiða við børnum og heilsu, t.d. sjúkrarøkt-arfrøðingar á barna- og føðideildum og heilsufrøðingar, sum arbeiða við smá-børnum og skúlabørnum. Barnaáhugabólkurin eitur FÀ 5, ið merkir fakligur áhugabólkur nummar 5.

## Norðurlendskt samstarv

Bjørghild Djurhuus, heilsufrøðingur, er formaður í FÁ 5. Hon greiðir frá, at tað eru slíkir áhugabólkar fyri børnum og heilsu í øllum norðurlondunum, og at tað er eitt sera gott og tætt samstarv ímillum nøkur av londunum.

Føroyar, Ísland, Danmark, Noreg og Svøríki møtast einaferð árliga. Grønland og Finnland eru ikki komin við í samstarvið enn, men Bjørgild vónar, at tað ikki verður so leingi, fyrr enn øll norðurlondini verða umboðað.

Norðurlendska samstarvið byrjaði í 1994, og FÁ 5 kom við í 2001.

– Vit møtast einaferð um árið í skiftandi vertslondum. Annaðhvørt ár er ein ráðstevna, har vit viðgera eitthvørt evni í samband við børn og heilsu, og annaðhvørt ár møtast vit til ein samstarvsfund, sigur hon.

Árligi samstarvsfundurin, og 10 ára jubileum fyri samstarvinum, hevur júst verið hildin her í Havnini, og Bjørghild sigur, at tær fingu allar sera nógv burturúr.

– Vit í Føroyum eru so isoleraðar til dagligt, langt burtur frá hinum, og tí er tað ómetaliga gott at kunna møtast, og greiða fra hvat rørir seg hjá hvørjum øðrum. À henda hátt frætta vit um øll hini norðanlondini, og ikki bert um Danmark, greiðir Bjørghild frá.

Til slíkar samstarvsfundir sum hesar, hava øll londini fyrireikað eina framløgu, um hvat rørir seg innan børn og heilsu júst nú. Fríggjadagurin verður nýttur til framløgur og kjak, soleiðis at fyrimunir og vansar við ymisku skipanunum kunnu verða funnir.

– Vit eru væl og virðiliga við, tá tað kemur til heilsurøkt hjá børnum, tað er so heilt víst. Vit hava avgjørt einki at skammast av, heldur Bjørghild.

– Sjálvsagt eru vit aftan fyri á nøkrum økjum, men vit eru frammaliga á øðrum økjum, so vit skulu als ikki smæðast burtur ímillum hesi stóru londini, heldur hon.

## Eingi føroysk hagtøl

Bjørghild sigur, at tað kom sera nógv av skafti á fundinum, sum júst varð hildin í Havn.

– Til samstarvsfundirnar, sum eru annaðhvørt ár, eru bert formenn í ymsu áhugabólkunum við. Vertslandið hevur tó alla nevndina við á fundunum. Men hóast vit bert vóru eini 20, so hava vit allar fingið nógv burturúr.

Eitt av evnunum, sum tosað varð um, var um heilsurøkt á skúlunum. Danmark hevur í seinastuni skorið ógvuliga nógv niður, hvat í heilsurøkt í skúlunum viðvíkur.

Í Svøríki harafturímóti ganga skúlabørnini til heilsufrøðing líka til tey fara úr studentaskúlanum.

Føroyar liggja væl við á tí økinum, tí her ganga skúlabørnini til skúlaheilsufrøðingin til og við 9. flokk.

Eitt økið, har Føroyar tó halta aftaná, er innan hagtøl.

– Tað er ógvuliga spell ikki at hava nøkur tøl at samanbera við, fyri at síggja hvønn veg rákið fer hjá okkum. T.d. innan vekt. Tað verður jú ógviliga nógv talað um etingarólag, eisini hjá børnum. Stórur partur av børnunum verður sagdur annaðhvørt at vera ov léttur ella ov tungur. Vit í Føroyum hava tó eingi tøl at meta okkum eftir. Vit hava bert danskar talvur at samanbera okkum við, og tað er jú ikki tað sama, sigur Bjørghild.

Hon leggur dent á, at vit jú ikki eta kost, ið kann samanberast við kostin í nøkrum øðrum landi. Hon sigur, at hóast danski og føroyski døgverðamaturin er vorðin líkari tey seinastu árini, eta føroyskar familjur enn nakað av føroyskum mati, sum ikki kann samanberast við tann danska.

– Tað, sum er so forferdiliga spell, er, at øll tølini finnast. Heilsufrøðingar á skúlunum hava altíð skrivað øll neyðug tøl upp, fyri hvørt einasta barn, sum hevur gingið í skúla. Onkur má bara gera tað arbeiðið, sum tað er, at savna tølini og gera talvur og diagramm, staðfestir Bjørghild Djurhuus.

Hon dugir tó ikki at siga hvør ið skuldi gjørt hetta arbeiðið, tí heilsufrøðingarnir sjálvir hava ikki tíð til tess.

– Kanska man kundi sett onkran, ið var undir hægri viðkomandi lestri, at skipa tølini, heldur hon. Tað kundi kansk verið eitt lestrarprojekt.

– So vórðu tølini til taks, og vit kundu fingið nyttu av teimum, líkasum hini londini hava nyttu av sínum tølum, staðfestir Bjørghild Djurhuus.

## Yvirlýsing

Á fundinum settu áhugabólkarnir sær eisini eitt mál.

– Vit ætla okkum at standa saman um eina yvirlýsing, ið júst skal snúgva seg um etingarólag hjá børnum. Hon skal sendast til Norðurlendska Ráðharraráðið, eins væl og til tær norðurlendsku stjórnirnar. Á henda hátt ætla vit at seta fokus á nøkur ting og markera okkum, greiðir Bjørghild frá.

Hon sigur at yvirlýsingin ætlandi skal vera send út seinast í hesum árinum.

– Hetta bleiv avgjørt á fundinum, sum var óalmindiliga konstruktivur. Tað er heilt sikkurt, at hetta nógva og stóra arbeiðið dryppar av onkustaðni, so tað ger ein mun, staðfestir Bjørghild.

Øll londini ganga høgt uppí hetta samstarvið, og øll síggja nyttuna av tí. Tí leggja vertslondini seg altíð eftir at velja eitt so gott og viðkomandi evnið sum gjørligt, og at samskipa ráðstevnurnar so væl sum yvirhøvur tilber.

Bjørghjild sigur, at FÁ 5 longu er farin undir at fyrireika næstu ferð, tær fáa vitjan av norðurlendska samstarvsbólkinum.

– Tað verður ikki fyrr enn í 2007, men tað er ongantíð ov tíðliga at byrja at fyrireika. Vit fara at seta okkum í samband við áhugabólkin fyri sálarsjúk, tí tær hildu eina so óalmindiliga væleydnaða ráðstevnu herfyri, greiðir Bjørghild frá.

Hon sigur, at tað til ráðstevnurnar koma eini 200-300 fólk, ið arbeiða innan børn og heilsu, so tað verður eitt størri tiltak enn samstarvsfundurin var.

– Tað er eitt stórt arbeiði, men tað gevur eisini úrslit. Og so havi eg nakrar ungar, deiligar og dynamiskar sjúkrasystrar afturat mær í nevndini. Nanna Kallsberg, Mari Johannesen, Gunnvá Viderø, Rúna Wardum, Minna Poulsen og Petra Arge eru í nevndini afturat mær. Tær eru veruliga nakrar eldsálir, sum brenna fyri tí, vit gera. Tá verður arbeiðið léttari av sær sjálvum, sigur Bjørghild Djurhuus at enda.



# Fín byrjan í Atlantis

**Seinasta leygarkvøld var og komandi trý leygarkvøldini verða beinleiðis undirhaldssendingar úr Atlantis í Klaksvík í Útvarpi Føroya. Leisturin er lætt prát, undirhald, tónleikur og so eitt hvørt óvæntað. Og tann fyrsta sendingin seinasta leygarkvøld má sigast at vera ein fín byrjan**

ÚTVARP
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Kristian Fríðrik Olsen var gestur í fyrstu beinleiðis undirhaldssendingini í útvarpinum, Leygarkvøld í Atlantis, sum Gunnar Nolsøe skipaði fyri*

**Klaksvík:**
Salurin í Atlantis er fullur av fólki. Úr hátalaranum hoyrist Leif Láadal í Útvarpinum, hann er í ferð við at fáa V4 dráttin avgreiddan.

Á pallinum í Atlantis sita nakrir tónleikarar klárir at taka yvir, tá V4 drátturin er liðugur. Útvarpsverturin, Gunnar Nolsøe, stendur púra klárur. Hóast talan er um beinleiðis sending og fullan sal, sær ikki út sum at teir heilt stóru nervarnir eru upp á spæl.

V4 drátturin er av, og tónleikararnir byrja at spæla. Eitt gott og flótandi byrjunarlag, og Gunnar byrjar so at tosa. Lógvabrestir hoyrast úr salinum, og so er støðið sett fyri einari beinleiðisundirhaldssending í útvarpinum.

Valið av luttakarum, sum Gunnar hevur gjørt, til hesa fyrstu sendingina, er væltroffið. Talan er um fólk, sum lutfalsliga eru kend í lokalsamfelagnum í Klaksvík, so harvið fangar hann áhoyrararnar, men hartil hava tey, kanska serliga talkshow-gesturin, Kristian Fríðrik Olsen, nógv gott upp á hjarta, sum ein og hvør kann seta seg inní. Óansæð hvar í landinum lurtarin býr.

Sendingin koyrir sum eftir ánni. Alt gongur upp á stás, og fólk lata eisini væl at aftaná. Gunnar fær nógv herðaklapp frá teimum mongu, sum lurtaðu í salinum. Eisini koma fólk, sum hava sitið heima og lurtað, ein túr í Atlantis at takka honum og hansara mongu hjálparfólkum.

## Fýra sendingar

Gunnar sigur, at ætlanin í fyrstu atløgu er at gera fýra slíkar sendingar.

– Tær verða sendar komandi trý leygarkvøldini, og so fáa vit at síggja, hvussu tað hevur gingið, sigur hann og leggur afturat, at hann var sjálvur vælnøgdur við fyrstu sendingina.

Onkur barnasjúka var, sambært honum, men onki, sum ikki kann rættast til næstu ferð.

Sendingin komandi leygarkvøld býður upp á ein gest, sum eitur Ólavur Samson, skemtarin verður Øssur Hentze, sum mangan hevur staðið á palli í Atlantis fyrr og á tónleikarasíðuni verður tað antin Arnfríð Lützen ella Mása Tróndheim, sum fara at syngja.

Gunnar sigur, at orsøkin til, at tað bert eru fýra sendingar í fyrstu atløgu er, at hetta er ein roynd.

– Tað er altíð gott at kunna royndarkoyra eitt konsept, og tað meti eg, ein fær gjørt við fýra sendingum, sigur hann. Men dylir tó ikki fyri, at tað er væl hugsandi, at fleiri fara at verða seinni, um hetta eydnast væl.

## Gamalt hugskot

Gunnar greiðir frá, at hugskotið um at gera eina beinleiðis undirhaldssending úr Klaksvík, er eitt gamalt hugskot. Hann hevur hugsað um tað í fleiri ár, men tað var ikki fyrr enn í vár, at hann veruliga fór undir at gera nakað við tað.

Tá so hugskotið varð lagt fram fyri leiðsluna í útvarpinum, vóru tey beinanvegin við upp á tað og hildu hugskotið vera gott.

Og nú ber so til at hoyra hetta hugskotið tey trý komandi leygarkvøldini afturat. Tað fyrsta livdi í øllum førum upp til sítt heitið, sum undirhaldssending.



*Leif Waag Høgnesen var skemtarin og hermarin leygarkvøldið*




*Steinvør Fonn var á tónleikakaféini í sendingini. Hon sang tvey vøkur løg, og var tað ein fínur endi upp á sendingina*

# Skótahjálpin av bakkastokki

**Nú fer skótahjálpin 2004 av bakkastokki. Í døgunum frá 18. til 25. september fara skótar at ganga runt og bjóða húsarhaldum hjálp til eitthvørt**

SKÓTAHJÁLPIN 2004
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Peningurin, sum kemur inn til Skótahjálpina, fer vanliga til eina føroyska og eina útlendska verkætlan.

Í ár er tað sjálvhjálparbólkarnir fyri børn og ung í Føroyum, sum hava mist foreldur við deyða, ið fær pengar frá Skótahjálpini.

Tann útlendska verkætlanin er arbeiðið hjá einum kolumbianskum biskuppi, ið eitur Tito Jesus Mora Esquerra. Hann hevur stovnað barnaheim í Kolumbia fyri børn hjá familjum, sum ofta eru flýdd frá lítla garði sínum, tí narkoharkalið hava tikin hann til sína óhugnaligu framleiðslu. Mangan er talan um einligar mammur við stórum barnaflokki, tí pápin er myrdur.

Endamálið við Skótahjálpini er, at frísk og røsk børn ella ung kunnu verða við til at hjálpa øðrum menniskjum bæði í heimlandi og útlandi, sum av eini ella aðrari orsøk ikki hava tað so gott.

Eisini ber til at stuðla Skótahjálpini peningaliga beinleiðis á eina av teirra kontum í peningastovnunum.

Hetta er 21. árið, at tær fýra skótasamskipanirnar í felag skipa fyri Skótahjálpini.

